# Lopfjølin

## Virknaðareftirmeting
## á várið 2019

---


Umbiðið av Mentamálaráðnum

Eftirmetingarleiðari: Jógvan Dahl
Í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya:
Annika Antoniussen
Erla Olsen




# *Skúlatilboðið Lopfjølin*

# *Margarinfabrikkin*

### *Tórshavnar Kommuna*

### *MMR á várið 2019*



**Síða**

# Innihald:

**1. Inngangur:** ... 6

**2. Skipan av frágreiðingini:** ... 6

**3. Háttalag:** ... 7

**3.1 Virknaðareftirmeting – processuella virknaðareftirmetingin:** ... 7

**3.2 Semistrukturerað interview og fokusbólkainterview:** ... 7

**3.3 Transskriptión (ljóðskriving) og viðgerð av transskriptinum:** ... 9

**4. Søguligt yvirlit:** ... 9

**4.1 Søgan víðari – fram til í dag:** ... 10

**5. Hagfrøðiligt yvirlit:** ... 11

**5.1 Heimildarstøðið fyri Lopfjølina:** ... 11

**5.2 Talva við yvirlitið yvir støðuna hjá næmingunum, sum hava gingið í Lopfjølini:** ... 12

**5.3 Aldur, tá tey byrjaðu:** ... 13

**5.4 Kynsbýtið:** ... 13

**5.5 Hvussu nógv hava fingið fráfaringarskjal:** ... 13

**5.6 Hvussu nógv eru farin aftur í upprunaflokk:** ... 14

**5.7 Hvar eru tey í dag:** ... 14

**6. Samrøðurnar:** ... 15

**6.1 Næmingarnir:** ... 15

**6.2 Foreldrini:** ... 16

**6.3 Bólkasamrøða við starvsfólk (námsfrøðingar, lærarar, leiðara):** ... 18

**6.4 Bólkasamrøða við tilvísingarbólkin:** ... 20

**6.5 Bólkasamrøða við skúlaleiðarar í Tórshavnar kommunu:** ... 22

**7. Niðurstøða:** ... 24

**8. Bókmentalisti/tilvísingar:** ... 25

**Esecutive summary**

This is an effect evaluation of the school offer *Lopfjølin*, which is not held at a school but in a youth club in order to accommodate the needs of pupils who find it difficult to attend regular school.

The students have been taken out of the regular school temporarily to attend Lopfjølin. For the most part, both Lopfjølin's structure and approach as well as the interaction with teachers and social educators has proven to be a positive experience for the pupils.

The teachers and social educators employ an openminded and tolerant conversational approach. They engage the pupils at the subject level they are at with the aim of helping them graduate from early secondary school (grade 9), enabling them to perform their best. Through conversation, the aim is also to help them become aware of their competencies, to gain self-confidence and belief in themselves.

Most pupils have experienced a marked success, being enabled to move ahead in the school system or in the work market, strengthened in the conviction that the future holds a range of opportunities for them.

Despite this success, none of the pupils were able to re-enter regular school, mostly due to negative circumstances. However, most of them have managed to receive their school diploma, to graduate from early secondary school.

In their input, parents emphasised the change they saw in their children's attitude, social life, academic improvement and especially in mental health, gaining increased self-confidence. Apart from this, they also had high praise for the co-operation with both the teachers and social educators, enabling them to support their children in the best way possible.

**Tilmæli**

Tilboðið heldur fram í Margarinfabrikkini, har tað er nú. Hetta er ein stór styrki hjá Lopfjølini, tí tey flestu ungu hava lætt við at koma í Margarinfabrikkini í mun til inn í ein vanligan skúla.

Lýsingin av skúlatilboðnum skal endurskoðast, so tað gerst nógv greiðari, hvør ið varðir av hvørjum – og hvussu samstarvið skal fara fram tvørgeiraliga.

Tímatalið skal hækkast, og størvini verða skipað sum tvey full námsfrøðingastørv og tvey full lærarastørv. Hetta í tráð við núverandi tal av næmingum, sum sett upp í lýsingini fyri verkætlanina Lopfjølin.

Málbólkurin verður víðkaður at umfata næmingar niður í 5. fl. – og tað skal ikki vera ein treyt, at barnið er í barnaverndarvirkisøki fyri at koma í Lopfjølina.

Næmingurin verður verandi innskrivaður í upprunaskúlanum, og samstarvið millum upprunaskúlan og Lopfjølina skal styrkjast.

Upplýst verður um tilboðið við faldara og heimasíðu, og vitjað verður í størri kommunum runt landið at kunna um Lopfjølina.

# 1. Inngangur

MMR hevur á heystið 2018 biðið um hesa virknaðareftirmeting í sambandi við norðurlendska samstarvið í verkætlanini: **Nordisk 0 – 24 projekt**: “Tværsektorielt arbejde for udsatte børn og unge,” har ætlanin er at stovna eitt net millum líknandi sernámsfrøðilig skúlatilboð í norðanlondunum og fáa íblástur og spjaða vitan millum norðanlondini.

Endamálið við eftirmetingini er at fáa staðfest, í hvønn mun málini fyri skúlatilboðið Lopfjølina eru rokkin og um tað er grundarlag fyri menning av líknandi tilboðum (fylgiskjal 1).

Skúlatilboðið Lopfjølin í Tórshavnar Kommunu er staðsett í virkishúsinum fyri børn og ung, Margarinfabrikkini, og hevur virkað í útvið 6 ár. Hetta er eitt styttri ella longri skúlatilboð fyri næmingar í skúlunum í Tórshavnar Kommunu, ið hava skúlaaftran. Tilboðið hevur í dag umstøður, orku og yrkisføri at kunna taka ímóti uml. 8 næmingum. Hesi 6 árini hava 22 næmingar brúkt tilboðið meira og minni. Hetta er við atliti til at arbeiða fyri, at næmingarnir kunna nema sær 9. floks prógv og eisini at kunna megna at koma aftur í upprunaflokkin.

Sett verður fram tað hugsanargrundarlag – við bakstøði í teimum innanhýsis málum, sum eru sett fyri Lopfjølina, at Lopfjølin hevur gjørt ein týðandi mun á jaligari leið fyri tey ungu, ið hava tikið av tilboðnum. Ætlanin við hesi virknaðareftirmeting er at kunna vísa á eyðkenni fyri úrslitum av ymiskum slagi, sum Lopfjølin hevur havt hesi 6 árini, hon hevur virkað.
Eftirmetingin skal hava við sær eitt tilmæli, sum kann liggja til grund fyri, hvussu kunnast kann um Lopfjølina við vón um, at tað kann hava við sær, at líknandi tilboð vera sett í verk kring landið.

# 2. Skipan av frágreiðingini

1. partur av frágreiðingini hevur háttalag, har greitt verður frá um innsavnan av empiri og um, hvussu tilgongdin er farin fram

2. partur er eitt søguligt baksýni – og ein lýsing av Lopfjølini, hvussu hon er skipað í dag

3. partur gevur eitt hagfrøðiligt yvirlit yvir gongdina í Lopfjølini

4. partur er viðgerð av samrøðum við børn og foreldur – og bólkasamrøður við trimum ymiskum bólkum

At enda er ein niðurstøða av virknaðareftirmetingini.

# 3. Háttalag

Fyri at fáa persónligar upplýsingar frá Sosialu deild í Tórshavnar kommunu, og fyri at fáa loyvi at gera ljóðupptøkur av samrøðum við ung undir 18 ár, varð søkt um loyvi frá Dátueftirlitinum við frágreiðing um verkætlanina og við frágreiðing um, hvussu tað verður farið fram – og hvat ið verður gjørt við tilfarið, tá verkætlanin er liðug (fylgiskjal 2). Sjálvsagt verður eisini søkt um samtykki frá foreldrunum at hava samrøðu við barn teirra.

Skriv varð sent øllum foreldrum og teirra børnum, har greitt varð frá eftirmetingini av Lopfjølini og endamálinum við eftirmetingini, har tey so vórðu spurd, um tey vildu luttaka í samrøðu í hesum sambandi (fylgiskjal 3). Har fyrrverandi næmingar vóru yvir 18 ár, varð sent teimum skriv beinleiðis (fylgiskjal 4).

## 3.1 Virknaðareftirmeting – processuella virknaðareftirmetingin

Valt var at gera eina virknaðareftirmeting, har kannað varð, hvørja ávirkan/úrslit skúlatilboðið Lopfjølin hevur havt fyri næmingarnar, ið hava verið virknir í tilboðnum.

Eftirmetingin skal geva eina mynd av samanhangi millum íløgu og virknað, og út frá kanningarspurningunum viðgera, hví og hvussu tilboðið virkar. Ein virknaðareftirmeting kann byggja brúgv millum tilgongdina og ávirkan/úrslit, har øll liðini verða kannað nærri (Dahler-Larsen & Krogstrup 2009, s.51). Hetta kann gerast á ymiskan hátt, har tað her verður arbeitt út frá tveimum sløgum av eftirmeting *"efficiency assesment,"* sum leggur dent á at staðfesta virknað av tilboðnum, og *"needs assesment,"* har dentur verður lagdur á at staðfesta grundarlagið fyri tørvinum á slíkum tilboðum (Johnson & Christensen, 2016, s.11). Virknaðareftirmetingin kann eisini gera sítt til, at uppskot verður sett fram um, hvussu tilboðið kann betrast.

## 3.2 Semistrukturerað interview og fokusbólkainterview

4 núverandi og fyrrverandi næmingar og foreldur teirra hava verið til samrøðu. Harumframt hevur eitt foreldur luttikið, har næmingurin var burturstaddur, og kundi tískil ikki vera við til samrøðu. Sostatt eru samrøður gjørdar við 4 næmingar og 5 foreldur.

Atlit skal takast til, at úttøkan av heimildarfólki var sjálvboðin luttøka, ið kann ávirka gildið av úrtøkuni frá samrøðunum. Her kann hugsast, at støðan viðv. resursum hjá familjunum (næmingunum) er meira ella minni avgerandi fyri, hvør ið velur at luttaka.

Harumframt vóru tríggjar fokusbólkasamrøður við tríggjar ymiskar bólkar:

| **Starvsfólkabólkurin** | **Tilvísingarbólkurin** | **Leiðarabólkurin** |
|---|---|---|
| Fróði Hansen, lærari<br>Elin M. Wiberg, lærari<br>Elin K. Jacobsen, námsfrøðingur<br>Dagmar Clothier, námsfrøðingur<br>Salua Manai, leiðari<br><br>Petur Háberg, fyrrv. lærari<br>Páll Mohr Joensen, fyrrv. lærari | Frida Poulsen, MMR<br>Harriet Hansen, Sernám<br>Marilyn Danielsen, Skúlin á Fløtum<br>Tina Lyager, Sosiala deild | Marjun Holm, Argjahamar,<br>Regin Marnersson, Skúlin á Fløtum,<br>Jón Højsted, Kollafjarðar skúli,<br>Bjarni Djurholm, Eysturskúlin,<br>Aslaug Olsen, Sankta Frans,<br>Hans Jón Thomsen, Hoyvíkar skúli,<br>Trine Joensen, Velbastaðar skúli,<br>Jákup av Skarði, Nólsoyar skúli,<br>Høgni Joensen, Løgmannabreyt,<br>Katrin Ellingsgaard, TK. |

Tilgongdin til samrøðurnar var tann semistruktureraða samrøðan, sum er vald, tí talan er um eitt *'livsverdensinterview,'* har dentur verður lagdur á upplivingar, tulkingar og fatanir hjá heimildarfólkinum, har samrøðan skal verða gerandiskend og einføld, sum ein opin samtala, har heimildarfólkið kennir seg væl (Kvale & Brinkman 2009, s. 30-

Harumframt var ein orðstýrari, sum nýtti ein ikki-stýrandi samrøðustíl, har tað var avgerandi at fáa fram so nógv og ymisk sjónarmið sum gjørligt. Orðstýrarin kunnaði um evnið og setti fram spurningar út frá samrøðuvegleiðingini til kjak og spurdi um ymiskt viðv. ymisku svarunum og sjónarmiðunum (Kvale & Brinkman 2009, s. 30-31).

Samrøðuleiðarin nýtti í báðum førum eina fyribrigdafrøðiliga (fænomenologisk) tilgongd, har dentur verður lagdur á,

> *"...at forstå fænomener ud fra aktørernes egne perspektiver og beskrive verden, som den opleves af informanterne, ud fra den antagelse, at den vigtige virkelighed er den, mennesker opfatter"* (Kvale S. & S. Brinkman 2009, s. 44).

Hetta kravdi, at samrøðuleiðarin var tilvitaður um og tók atlit til, at forfatanir vórðu settar í *'klombur'* fyri at fáa eina fordómsleysa lýsing av samrøðuni. Tann opna fyribrigdafrøðiliga tilgongdin hevur við sær, at samrøðuleiðarin lærir og ognar sær vitan frá heimildarfólkinum.

Áðrenn samrøðurnar varð ein samrøðuvegleiðing gjørd, ið varð nýtt sum eitt handrit, ið skipaði gongdina í samrøðuni (fylgiskjal 5). Vegleiðingarnar, bæði til semistruktureraðu samrøðurnar og til fokusbólkasamrøðurnar, umfataðu endamál, málbólkar, evni og uppskot til spurningar. Samsvarandi opnu samrøðuni, ið eyðkennir semistrukteraða samrøðu, legði samrøðuleiðarin dent á at meta um, í hvønn mun spurningarnir í samrøðuvegleiðingini vórðu fylgdir – og hvussu nógv fylgt varð upp á svarini frá heimildarfólkinum. Hetta er avgerandi fyri úrtøkuna, tí tað er ongantíð greitt frammanundan, hvussu svarað verður (Kvale & Brinkman 2009, s. 151).

### 3.3 Transskriptión (ljóðskriving) og viðgerð av transskriptinum

Sum ein partur av tulkingartilgongdini, varð ljóðupptøkan av samrøðunum umskrivað til tekst. Transkriptiónin gevur eitt nýtt innlit í samrøðurnar, tí tað er ein greiður munur á reglunum fyri, hvat ein vælorðað samtala er og hvat ein vælskrivaður tekstur er. Í transskriberingini var ikki tikið atlit til fyribrigdi so sum kropsmál, mállegu og handabrøgd, og tí er transskriptiónin ein dekontekstualiserað endurgeving av samrøðuni (Kvale & Brinkman 2009, s. 200).

Síðani varð transskriptið tulkað eftir teimum hermeneutisku tulkingarprinsippunum, sum hava til endamáls at tryggja haldgóðar tulkingar. Síðani vórðu tulkingarnar flokkaðar við støði í endamálunum fyri interviewini. Í tulkingartilgongdini var ein objektiv tilgongd nýtt, har atlit varð tikið til '*common sence,'* ið leggur upp til fjølbroyttar tulkingar, vitandi, at tað finst ikki ein røtt tulking (Kvale & Brinkman 2009, s. 200). Harumframt varð transkriptið skrivað orðarætt, tó uttan at dentur var lagdur á herðingar.

# 4. Søguligt yvirlit

Í skúlaárunum 2009/2013 hevði Venjingarskúlin í Tórshavn eitt royndar- og menningarvirksemi (fylgiskjal 6), sum hevði til endamáls at hjálpa næmingum, sum av sosialum ella sálarligum orsøkum ikki vóru førir fyri at vera í heimaflokkinum saman við sínum floksfelagum – ella í heila tikið at vera í skúla. Tað, sum varð ætlanin, var at fáa eitt samstarv í lag millum skúlarnar í Tórshavnar Kommunu – í fyrstu atløgu teir við framhaldsdeild í Tórshavn. Hetta vildi geva nakrar eyðsýndar fyrimunir:

a) Tað fæst eitt størri tal av tímum fyri 'minni pening,' um fleiri skúlar leggja tímar til felags verkætlan

b) At bólka næmingar eftir teirra sosialu/sálarligu/fakligu støðu, har tann einstaki við fyrimuni kann taka avbjóðingarnar í felagsskapi við hini í sínum bólki
c) næmingarnir fara ætlandi at hava léttari við at kenna tilknýti til teirra heimaflokk, um teir ein part av tíðini eru í einum skúlahøpi, sum teir betur kunnu góðtaka – enn at ganga egnar leiðir

Avtalað varð, at skúlarnir – um ikki annað frættist frá MMR - hvør í sínum lagi seta lærarar til "heima og sjúkraundirvísing" fram til 31. desember 2014. Avklárast skal við Mentamálaráðið, um ein loysn kann finnast uppá læraraspurningin 1 januar 2015 (fylgiskjal 7).

## 4.1 Søgan víðari – fram til í dag

Í fyrstani vórðu tímar til undirvising játtaðir tí einstaka næminginum, og tað komu lærarar frá avvarðandi skúla at undirvísa í Margarinfabrikkini. Hetta var, sum tíðin fráleið, hildið at vera óheppið, so hvørt sum tað vóru fleiri næmingar, ið komu í Margarinfabrikkini og høvdu tørv á undirvísing. – Hugskotið var jú, at tímarnir, ið vórðu játtaðir til heima- og sjúkraundirvísing til hesar næmingar, ið høvdu skúlaaftran, kundu koma fleiri til góðar í einum felags skúlatilboði, - og at tey vónandi eisini kundu hava gleði av hvørjum øðrum og finna sosiala styrki í at vera saman við øðrum, ið vóru í sama báti sum tey.
Tað vísti seg eisini mangan at vera ein avbjóðing hjá tí einstaka skúlanum at finna lærarar til heima- og sjúkraundirvísing, sum bæði høvdu áhuga, fakligan og sosialan førleika – og royndir við slíkum serligum undirvísingararbeiði. Tí var tað rættiliga tíðliga í tilgongdini skipað fyri, at tað vóru ávísir lærarar, sum tóku sær av undirvísingini í Margarinfabrikkini.

Tey fyrstu árini, eftir at skúlatilboðið Lopfjølin varð stovnsett í august 2014, vóru lærararnir settir við ymiskum tímatali – alt eftir næmingatalinum. Samlaða tímajáttanin var leingi uml. 20 tímar um vikuna, og har vóru bæði tríggir og fýra lærarar í ávís tíðarskeið at býta hesar fáu tímar millum sín. Tað gjørdi tað trupult við samstarvi, tá mesta av arbeiðnum hjá lærarunum lá aðrastaðni.
Venjingarskúlin, seinni Skúlin á Fløtum, SáF (1. januar 2015) var skúlin, sum umboðaði hinar skúlarnar viðv. námsfrøðiligari ábyrgd, vegleiðing, undirvísingartilfari – og umsitingarliga við royndum, próvtøkum og aðrari umsiting (lønarseðlar o.a.)

Frá 2016 varð tímajáttanin til undirvísing hækkað til 30 tímar, við tað at næmingatalið eisini varð hækkað. Játtanin frá Sosialu deild var eisini hækkað, soleiðis at tveir námsfrøðingar arbeiddu nú hálva tíð í Lopfjølini.

Í dag eru tveir lærarar settir – við virksemisætlan í Skúlanum á Fløtum. Annar við 22 tímum – og restin av hansara tímum upp til fult starv – eru í Margarinfabrikkini í frítíðarpartinum. Hin er settur 18 tímar í Lopfjølini – og restin í SáF. Hetta ger, at arbeiðið í dag er nógv støðugari – og samstarvið í starvsfólkabólkinum neyvari.

Tvær lýsingar av verkætlanini hava verið skrivaðar síðani 2013 – tann síðsta í juni 2016. (fylgiskjøl 8,9).

# 5. Hagfrøðiligt yvirlit

## 5.1 Heimildarstøðið fyri Lopfjølina

Í lýsingini av verkætlanini Lopfjølini verður víst á, hvørjir partar hava leiklut í virkseminum um Lopfjølina (fylgiskjal 9). Luttakandi partarnir eru: Barnaverndartænastan, upprunaskúlin, Sernám, og "Visitatiónsnevndin er samansett av leiðaranum í Sernámi, undirvísingarleiðaranum umboðandi skúlarnar, dagliga leiðaranum í Margarinfabrikkini og einum umboði vegna BVT."

Hetta merkir, at øll børn og ung, sum higartil hava verið – og eru – í Lopfjølini, samstundis eisini eru í virkisøkinum hjá BVT. Skjølini í Sosialu deild vísa yvirlit yvir øll, sum hava verið í Lopfjølini – og nær tey eru komin inn í Lopfjølina.

Undirvísingarleiðarin umboðandi skúlarnar er varastjóri í Skúlanum á Fløtum, og skúlin hevur havt námsfrøðiligu og umsitingarligu ábyrgdina frá byrjanini av. Hetta merkir, at øll skjøl, ið hava við royndir og próvtøkur at gera, eru at finna í skjalgoymslu Skúlans á Fløtum. Haðani kemur yvirlitið yvir, hvør ið hevur fingið fráfaringarskjøl – og nær.

## 5.2 Talva við yvirlitið yvir støðuna hjá næmingunum, sum hava gingið í Lopfjølini

Talvan vísir, nær næmingurin er byrjaður í Lopfjølini, nær hann hevur fingið fráfaringarskjal, og hvar hann møguliga er í dag.

| Næming | Byrjað | Fráfaringarskjal | Hvar er hann/hon í dag |
|---|---|---|---|
| G 15 | Jan 2018 | | Gongur í Lopfjølini í løtuni. Fer á NámX í august 2019 |
| G 14 | Mai 2018 | | Gongur í Lopfjølini í løtuni. Fer møguliga aftur í upprunaskúlan SáF at taka 9. flokk. Síðani verður tað helst eitt ár uttan skúla ("har eg kann anda...") – og so eftir tað á Glasir. Arbeiðir í løtuni í vøggustovu 4-5 t/vikuna |
| G 17 | Des 2016 | Juni 2017 + 2018 | Gongur í 1. G á Glasi |
| G 18 | Aug 2016 (15) | Juni 2016 + 2017 + 2018 | Gongur ikki í skúla í løtuni – arbeiðir við rossum |
| D 18 | Jan 2017 | Juni 2017 + 2018 | Til skips við Brimli.... (?) |
| G 17 | Feb 2017 | | Tekur 9.fl. í DK í løtuni |
| D 14 | Var heilt stutt | | Guli skúli, 7. fl. 2018/2019 |
| G 16 | Aug 2017 | Juni 2018 | Ætlar sær at taka 9. fl. í summar. Síðani á Føroya Fólkaháskúla, síðani Miðnám 2020 Makeup-artist-útbúgving á Glasi |
| G 14 | Var stutt | | Hon er í DK á døgnstovni |
| G 17 | Var heilt stutt | | |
| G 14 | Okt. 2018 Var heilt stutt – og fór aftur í skúla | | Aftur á Løgmannabreyt. |
| D 18 | Nov. 2014 | 2017 Guli sk. 9. fl. | Guli skúli 2015 – Eftir 9. fl. fór hann á skipasmiðjuna – men spurn. er, hvar hann er nú. |
| D 20 | Úr NámX 2015. Byrjaði starvsvenjing sep. 2015 | | Er ella hevur verið í viðgerð fyri rúsevnis-trupulleikar. |
| D 18 | Mar. 2016 | Juni 2016 + 2017 | Arbeiðir hjá einum rørsmiði – ætlar at fara í læru |
| D 15 | Aug 2017 | | Hann gongur í Lopfjølini – og ætlar í NámX |
| G 20 | Jan 2014 | Juni 2014 + Juni 2015 NámX | Býr niðri í løtuni. Gingið á HF í Klaksvík |
| G 21 | Feb 2016 | Juni 2016 | Fer á miðnámskúla eftir summarfrítíðina |
| G 19 | Feb 2014 | Juni 2016 | Arbeiðir. Hevur eisini tikið makeup artist... |
| G 18 | Aug 2015 | Juni 2016 + 2017 | Gongur við Áir, ætlar sær víðari á Glasir |
| D 20 | Des 2014 | Juni 2016 | Gongur á Glasi í serbreyt (yrkisrættað Nám) |
| D 13 | Mar 2017 | | Gongur í Lopfjølini – men er bara heima |
| D 19 | Aug 2015 | Juni 2016 + 2017 + 2018. | Til sjós við fiskiskipi |

## 5.3 Aldur, tá tey byrjaðu




Tey flestu eru í framhaldsdeildini, tá tey søkja um at koma inn á Lopfjølina. Tað hevur verið nógv umrøtt viðvíkjandi aldrinum, at tá tey koma so seint inn á Lopfjølina, tá verða líkindini fyri at koma aftur í upprunaskúlan tess minni.
Í yvirlitinum her er miðaldurin 14,2 ár.

## 5.4 Kynsbýtið

Sum talvan vísir, so er kynsbýtið 13 gentur og 9 dreingir. Tað svarar til í prosentum: gentur 59 % og dreingir 41 %. Um hetta er ein ikki tilvildarlig helling er ilt at siga, tí vit hava ikki so nógv tøl at gera metingar út frá.







## 5.5 Hvussu nógv hava fingið fráfaringarskjal

12 av 14 eru komin á mál viðv. at fáa 9. floks prógv, meðan 8 framvegis eru í skúlaaldri. Fyri summi er próvskjalið ikki fullfíggjað, t.v.s. at tey møguliga mangla onkra lærugrein.

### 5.6 Hvussu nógv eru farin aftur í upprunaflokk

Bert tvey eru komin á mál viðvíkjandi einum av innanhýsis lutmálunum, nevniliga hetta at megna at koma aftur í upprunaflokkin í heimaskúlanum. Hetta svarar til 9 %. Hetta er eitt lágt prosenttal – og er ein sterk ábending um, at hesi børn og hesi ungu hava stórar avbjóðingar av ymiskum slagi.




### 5.7 Hvar eru tey í dag




Talvan vísir, at 3 dreingir og 5 gentur eru framvegis í skúlaaldri – og telja tí ikki við millum tey, ið fara víðari eftir lokna tíð í Lopfjølini. Her er ein drongur og 3 gentur, ið ikki fyribils eru farin víðari við nøkrum. Men 5 dreingir og 5 gentur eru farin víðari við útbúgving ella arbeiði.

# 6. Samrøðurnar

## 6.1 Næmingarnir

Samrøðurnar við næmingarnar, ið hava gingið ella ganga á Lopfjølini, bygdu á og tóku støði í teimum skúlaroyndum og upplivingum, ið næmingarnir høvdu havt, áðrenn teir vórðu knýttir at Lopfjølini. Hetta, tí at næmingarnir vóru sálarliga merktir av einari skúlagongd, ið ikki hevði gingið eftir vild, og teir tosa tískil um *"tannáringa tunglyndi"*, *"...eg hevði tað ikki gott sálarliga, var deprimerað..."* og at skúlagongdin førdi við sær, at *"...kroppurin fór í lás, eg kundi ikki, eg fór ikki, altso tað var tað ringasta, gysiligasta følilsi...tann tíðin var ordiliga tung..."*(fylgiskjal 10,A,B,C). Næmingarnir vísa á, at teir ikki kendu á sær, at teir megnaðu skúlagongdina í fólkaskúlanum nóg væl og út frá hesum uppliva møtið við Lopfjølina sum eina frígering, har tilgongdin er øðrvísi: Teir verða møttir, har teir eru fakliga, sosialt og persónliga. Hetta hevði ta fylgju, at teir kendu seg tryggar í umhvørvinum bæði við námsfrøðingar, lærarar og aðrar næmingar, teir høvdu álit á fakfólkunum. Kenslan hjá einum næmingi var, at

> *"...tað var ordiliga lætt í mun til áðrenn...tað var ordiliga lekkurt...eg kundi ikki verið meira nøgd...eg fekk ordiliga frið í sálina..."*(fylgiskjal 11).

Bæði námsfrøðingar og lærarar møttu næmingunum, tá teir komu á Lopfjølina, við blíðni og eini vinaligari móttøku. Tey góvu sær stundir at tosa við tey, spyrja um, hvørji áhugamál og hvørjar fakligar avbjóðingar, tey høvdu og hvørjum fakligum málum, tey vildu røkka.

Tað kemur greitt fram í viðtalunum, at á Lopfjølini tekur starvsfólkið støði í einstaka næminginum. Ein næmingur fortelur, at frá at vera ein persónur, sum hevði tað ringt við sær sjálvum, føldi seg annarleiðis, so hjálptu tey honum, tey skiltu hann uppá ein heilt annan máta enn onnur, og tey dømdu hann ikki, hann kundi fortelja teimum alt (fylgiskjal 12). Hendan tilgongdin var við til at uppbyggja sjálvsálitið. Hetta er gjøgnumgangandi hjá øllum næmingunum í samrøðunum, at hava líknandi upplivilsir av at byrja á Lopfjølini, og at hendan broytingin hevur ført við sær eina størri lívsgleði og størri sjálvsálit, sum er grundarlagið fyri at kunna trúgva uppá seg sjálvan og kunna mennast í tí skúlaumvhørvinum, sum Lopfjølin bjóðar.

Samrøðurnar geva eina ábending um, at trivnaður, tryggleiki og endurvunna sjálvsálitið hevur havt ein leiklut í fakligu menningini. Undirvísingin varð næmingalaðað við støði í tí einstaka næminginum, har næmingurin lærdi út frá tí støðinum, hann var á. Hetta hevur ávirkað hugin at læra, har ein næmingur sigur:

*“...tað er simpulten so lætt og tey læra meg væl...eg havi virkuliga hug at sita har saman við teimum og læra ordiliga.”* (fylgiskjal 13).

Næmingarnir fingu hjálp, tá tørvur var á tí, tað var í lagi ikki at duga eitthvørt, og har var eingin vandi fyri at siga eitthvørt. Hetta eru eyðkenni, ið mynda eitt trygt, gott og mennandi læruumhvørvi, sum eygleiðir og uppfatar næmingin sum eitt heilt menniskja.

Í tilgongdini er eyðsæð, at førleikarnir hjá námsfrøðingunum og lærarunum hvør í sær verða nýttir til fulnar í einum góðum samstarvi rundan um og við næmingarnar. At tvørprofessionella samstarvið hevur riggað og tískil tænt øllum pørtum, gongur aftur í samrøðunum, hvussu teir kenna ágóðan av hesi holistisku tilgongdini, ið megnar at fevna um næmingin sálarliga, persónliga, sosialt og fakliga.

Ongin av fyrrverandi næmingunum eru farnir aftur í upprunaskúlan, men hava tikið 9. floks prógv og eru komnir víðari við lestri á ymiskan hátt. Hetta við eini fatan av, sum tveir av næmingunum vísa á, at:

*“...eg hevði ikki blivið liðug við 9. flokk, um tað ikki var fyri Lopfjølina...”* og *“...var eg næstan droppað úr 9. flokki og sjálvandi uttan eitt 9. floks prógv...”*(fylgiskjal 14,A,B).

Útlitini fyri hesar næmingar eru fullkomiliga broytt til at kenna seg dugnalig og síggja møguleikar fyri víðari lestri ella innan ymisk starvsøki – í eini bjartari framtíð.

## 6.2 Foreldrini

Samrøðurnar við foreldrini hjá næmingunum á Lopfjølini góvu eina mynd av, at upplivingarnar frá fólkaskúlanum vóru merktar av mistrivnaði og strongd, ið lutvíst førdi við sær, at teir kendu tað tungt og trupult at fara í skúla, har tey øll høvdu eina lutfalsliga høga fráveru. Eitt foreldur segði millum annað, at barn teirra *“...treivst illa í fólkaskúlanum...”* var *“...niðurundirkomin, so keddur av tí...”* (fylgiskjal 15,A,B). Eitt annað foreldur greiddi frá, at *“...avbjóðingin hjá X, tað er skúlaskipanin...tað er meira skúlin og skipanin, sum X ikki megnar...”* (fylgiskjal 15,C). Her vísa foreldrini á eina tíð, har næmingurin hevur mistrivist, kent seg ótryggan og ikki hoyrdan, sum hevur havt ávirkan á fakligu læringina. Í samrøðunum eru ábendingar um, at hendan støðan, næmingarnir hava verið í, hevur vart í longri tíðarskeið, tað hevur tikið langa tíð, frá at foreldrini gerast varug við, at barn teirra hevur ilt við at koma í skúla og at megna skúlaarbeiði, at tað fær eitt ávíst tilboð at byrja í Lopfjølini. Eitt foreldur fortelur, at

> *"...X byrjar at fáa trupulleikar, tað er í pubertetinum, tað er í 6.-7. flokki, at hann byrjar at fáa trupulleikar av ymiskum slagi, fær tað verri og verri yvirhøvur, fær ringt við at koma í skúla og sovorðið. Tað strekkir seg yvir langa tíð."* (fylgiskjal 16).

Tað er tó ikki greitt í samrøðunum, hvussu er og ikki í tilgongdini hjá og í samstarvinum við avvarðandi skúla, men flestu foreldrini leggja stóran dent á, at broytingin er eyðsýnd til tað betra, bæði persónliga, fakliga og sosialt.

Eftir at næmingarnir byrjaðu á Lopfjølini, uppliva fýra av fimm foreldrum, at umstøðurnar hjá børnum teirra broytast til tað betra,

> *"...tað hevur verið heilt fantastist fyri X..."* og *"...X varð meira avslappaður...X var als ikki at kenna aftur og nógv meira glaður, og glaðari og ikki so uppfarandi og illsintur..."* (fylgiskjal 17,A,B).

Har var ein næmingur; hóast honum dámdi væl Lopfjølina og var væl nøgdur við undirvísingina, mettu foreldrini ikki, *"...at man kendi nakra broyting..."* (fylgiskjal 17, C) Tað, at næmingarnir hava ymisk upplivilsir av Lopfjølini, kann vera tengt at, hvørjar avbjóðingar næmingarnir hava, og sambært samrøðunum, kann talan verða um sálarligar avbjóðingar, tunglyndi, diagnosir og annað. Hugsast kann, at tað í ávísum førum kann vera tørvur á eini viðgerð, samstundis sum næmingurin er virkin á Lopfjølini. Men hóast nakrir av næmingunum hava diagnosur, so hava teir klára seg væl, bæði persónliga fakliga og sosialt. Starvsfólkini hava megnað at tikið støði í styrkleika hjá næmingunum á tann hátt, at

> *"...at fólkið her niðri maktaði væl tað at fáa X inn og práta við X, hvat er tað, tú hugsar, hvat er tað tú ætlar, so X slapp nógv til orðanna...tað gjørdi...X føldi seg týdningarmiklan fyri onnur enn bara okkum...)* (fylgiskjal 18),

har avbjóðingarnar hjá næmingunum vórðu viðurkendar, ið kundu viðføra ávísar avmarkingar í mun til skúlagongdina, men at hetta var góðtikið, og støði varð tikið í, hvat næmingurin megnaði og vildi. Hendan tilgongdin hevur havt við sær , at *"...sjálvsálitið sum er vorðið bygt upp aftur..."* og sum aftur hevur havt við sær, at *"...X fekk meira dirvi at kasta seg út í ymisk ting..."* (fylgiskjal 19,A,B).

Sambært foreldrunum, trivust allir næmingarnir á Lopfjølini, og summir gjørdust glaðari og gjørdust meira sosialir, megnaðu at fara meira út. Harumframt upplivdu øll eina framgongd í fakligu menningini, har næmingarnir fingu eina viðurkenning av

*"...hvussu skjótt ein kundi læra eitt ella annað, tá ein sat einsamallur og bara friður kom niður á ein og ein fór at gera eitt ella annað..."* (fylgiskjal 19,C),

har foreldrini upplivdu, at barn teirra kom heim og var *"uppi í skýggjunum,"* tí nú dugdi tað t.d. at seta ð. Hetta at gerast tilvitaður um, hvat ein dugir væl og hvat ein skal arbeiða meira við og hvussu ein lærir best, í hvørjum kringumstøðum og í hvørjari tilgongd, fakfólkini eru í.

Tilgongdin bæði við fakligu og persónligu menningini fevnir eisini um foreldrasamstarv, har eitt foreldur vísir á ein týðiligan mun frá fólkaskúlanum, sum hevur havt týdning fyri sambandið millum seg og barnið. Tá eitthvørt hevur stungið seg upp, so verður tikið hond um tað beinanvegin, bæði hjá lærarunum og námsfrøðingunum, tað er ikki neyðugt at fara til ymisk fakfólk fyri at fáa aftursvar, tað er smidligt, og tað er týðiligt, at fakfólkini samstarva um næmingarnar (fylgiskjal 20). Hetta hevur ført við sær, at foreldur og barn í størri mun hava kunna verið saman um skiftið frá fólkaskúlanum og í Lopfjølina, og hetta hevur eisini betrað um viðurskiftini sum heild í heiminum.

## 6.3 Bólkasamrøða við starvsfólk (námsfrøðingar, lærarar, leiðara)

Tað hevur verið ein long tilgongd frá fyrstani tíð í Lopfjølini, har byrjanin var rættiliga trilvandi. Í fyrstani komu lærarar frá avvarðandi skúla inn á Margarinfabrikkina at undirvísa. Tað gav ikki nakra meining, tá hugsað verður um at samstarva inni í Margarinfabrikkini um tey ungu.

So byrjaði tað við at vera ein lærari og ein námsfrøðingur, og síðani til at vera tveir námsfrøðingar og fýra lærarar, hvør lærari við fáum tímum – til í dag, har tað eru tveir fastir námsfrøðingar og tveir fastir lærarar, tó ikki í fullum starvi. Tað verður nevnt, at tað var ringt at hava nakað samstarv, tí man var ikki samstundis til arbeiðis. Tað var ringt at finna tíðir til fundir og ráðleggingar.

Samstarvið og samskiftið í fasta toyminum er í dag ógvuliga gott. Tað er komið í eina meira fasta skipan, har fastur fundur er annanhvønn mikudag soleiðis at til ber at taka samanum, um okkurt er viðvíkjandi einum næmingi – ella okkurt evni, sum er aktuelt í løtuni, soleiðis at tað ikki dettur niður ímillum. Marylin Danielsen frá Skúlanum á Fløtum er við, har aktuell viðurskifti verða viðgjørd, og ætlanir fyri nærmastu framtíð verða lagdar. Tað verður eisini nevnt, at tað er ikki bara 14. hvønn dag, at tað verður samskift. Tað fer fram hvønn einasta dag, tí øll eru jú har hvønn dag.

Tann sosiali týdningurin fyri næmingarnar við dagliga morgunmatarborðinum er stórur. Har verður tosað saman um mangt og hvat, og næmingarnir fáa eisini orðið. Teir kenna seg so við og við meira tryggar – og eisini fríari í teirri sosialu støðuni, sum er við morgunmatarborðið. Hendan løtan hevur alstóran týdning í tí sosialnámsfrøðiliga arbeiðnum í Lopfjølini.
Námsfrøðingarnir eru kontaktpersónar hjá teimum ávísu børnunum/teimum ungu, har tær býta tey millum sín. Tað er nógv samstarv vegna tann einstaka, ikki minst við foreldrini, við avvarðandi myndugleikar – og við skúlarnar, har tey eru innskrivað. Í hesum sambandi er nógv fundarvirksemi. Lærararnir eru eisini partur í hesum arbeiðnum – teir taka sær ikki bara av undirvísing. Teir eru nógv inni á tí sosialnámsfrøðiliga eisini, tí tá ein næmingur ikki hevur tað so gott, so fæst einki burtur úr undirvsíngini álíkavæl.

Námsfrøðingarnir hava nógv skapandi virki við næmingunum – blandað við relatiónsskapandi samveru – práti – lívssøgum o.ø. Tað verður vant nógv ymiskt saman við næmingunum, at gera mat, mála – nógv ymiskt kreativt. Tað hevur stóran týdning at vera saman um hetta, tí tá tað kemur til prát, har tað er týdningarmikið, at tey fáa sett orð á, hvussu tey hava tað, tá er tað nógv lættari og meira nátúrligt, at tað verður gjørt, meðan man er í gongd við nakað kreativt – í staðin fyri at seta seg niður og siga: Nú skulu vit hava eitt gott prát.

Tvørgeiraliga samstarvið er yvirhøvur gott, ikki minst við Skúlan á Fløtum. Samstarvið við Sosialu deild hevur verið ótrúliga gott í fleiri viðurskiftum, ikki minst hetta at Tina Lyager ofta hevur hjálpt við at finna eitt arbeiði til nøkur av teimum ungu, so at tilboðið í eina tíð hevur verið víðkað út á seinnapartin eisini. Tó verður fýlst á, at viðgerðir hjá Sernámi taka langa tíð. Tað sama við Barnaverndartænastuni, at tað tekur ofta alt ov langa tíð.

Tað hevur víst seg at eydnast illa at náa málinum, at næmingurin kemur aftur í upprunaskúlan. Hildið verður eisini, at starvsfólk frá upprunaskúlanum hava ikki víst nakran serligan áhuga fyri fyrrverandi næmingi hjá teimum. Spurningurin er eisini, um tað er avvarðandi skúlin, sum hevur ábyrgd av at halda sambandið við líka – ella tað er Lopfjølin. Hjá teimum, sum eru farin á NámX, hevur tað eydnast best við at koma aftur í upprunaskúlan. Eitt annað, sum fleiri ferðir hevur verið nevnt, er, at jú yngri, tey eru, tá tey koma í Lopfjølina, størri eru líkindini fyri at koma aftur í upprunaskúlan.

Tá talan er um, at næmingarnir skulu taka 9. floks prógv, verður sagt, at tað er stórur munur á skrivligum avrikum í mun til munnligu, har tey yvirhøvur klára seg sera væl. Støddfrøði er ein stórur trupulleiki fyri tey flestu. Man má rokna við minst tvey ár at koma fram til 9. fl. prógv. Tað er eisini ein stór avbjóðing at hava allar lærugreinirnar. Men hildið verður, at serliga, tá tað snýr seg um,

hvussu nógv, ið hava megnað at fáa eitt fráfaringarskjal av øllum, sum hava gingið á Lopfjølini, so má man siga, at tað er áhugavert.

Tá tað kemur til vandan fyri lógarbrotum og/ella evnismisnýtslu, tá er foreldrasamstarvið eyka týdningarmikið. Men hóast tað er tað ofta til fánýtis, tí umstøðurnar heima eru ikki nóg góðar. Tað skal í flestu førum nógv meira víttfevnt arbeiði til, enn tað, sum er møguligt innan karmarnar hjá Lopfjølini.

Hetta skúlatilboðið er komið fyri at vera, so sum gongdin er í løtuni. Talið av næmingum skal ikki upp um 8 – uttan so, at tað verður í tveimum pørtum...Tað eiga at vera tvey fulltíðar lærarastørv í Lopfjølini. Fyri at fyribyrgja skúlaaftran, so er tað umráðandi at fáa fatur á børnunum so tíðliga sum møguligt. Tá eru líkindini nógv størri fyri, at tey koma aftur í upprunaskúlan. Tað skal ikki vera ein treyt, at tað er eitt barnaverndarmál, áðrenn eitt barn kann koma í Lopfjølina.

## 6.4 Bólkasamrøða við tilvísingarbólkin

Í tilvísingarbólkinum verður tvørgeiraliga samstarvið nógv viðgjørt. Ein av stóru spurningunum, sum settur verður, er: Hvat skulu vit gera við børn, sum hvørki Sosiala deild, Sernám, fólkaskúlin ella foreldrini sjálvi megna at hjálpa?

Í Lopfjølini kenna børnini seg meira trygg. Har eru kanska bara tvey vaksin, sum tey hava rundan um seg. Fyri tey flestu, sum hava skúlaaftran – við ymiskum avbjóðingum – er tað ein ógvuliga stórur munur á at vera í vanliga fólkaskúlanum í mun til at vera í Lopfjølini. Tey verða møtt, júst har tey eru, og einki skal ganga skjótari, enn at tey sjálvi kunnu fylgja við. Hetta, at tveir námsfrøðingar og tveir lærarar eru um tey, har man í toyminum alla tíðina veit, hvussu nógvur dentur skal verða lagdur á tann sosiala ella persónliga partin í mun til tað fakliga. Tað ger, at tey kenna seg trygg og verða vird – og tá kunnu tey mennast.

Tað vísir seg ikki at eydnast væl viðvíkjandi at fáa tey ungu aftur í upprunaflokkin. Tað stendur í kunngerðini, at tað skal tað verða arbeitt fram ímóti – og tað er eisini ein av týdningunum í orðinum Lopfjølin. Eitt rættiliga týðiligt rák hesum viðvíkjandi er, at jú yngri, tey eru, tá tey koma í Lopfjølina, jú størri eru líkindini fyri, at tey megna at koma aftur í upprunaflokkin. Tó hevur tað eisini víst seg í nøkrum førum, at tey, sum megna at fara á NámX, meðan tey samstundis royna at gera seg lidnan í Lopfjølini, onkrum av teimum hevur tað hepnast at fara aftur í upprunaskúlan.

Í Sernámi hava tey fingið fyrispurning, um tað var ein møguleiki, at Guli skúli var ein móttakari til Lopfjølina, t.v.s. tey verða fyrst ment niðri í Lopfjølini, og so verða tey slúsað út í – ikki ein vanligan skúla aftur – men í Gula skúla, fyri ikki at koma aftur í eitt stórt forum. Tí tað er tað, sum so ofta er so ringt, tað er at koma inn i tann gamla klassan, koma inn aftur í ein meldur, sum man hevur verið í. Okkurt dømi er, har næmingur er komin í Gula skúla úr Lopfjølini. Tað er ein jaligur og skilagóður tanki at arbeiða fyri einum samstarvi millum Lopfjølina, NámX og Gula skúla, so at ymiskir samansettir møguleikar kunnu standa opnir fyri teimum ungu, sum hava serligar avbjóðingar.

Tá børn verða innskrivað í skúla, so eru tey í tí skúlanum, so leingi sum einki annað hendir. Um barnið so fer í Lopfjølina, so skal man hava eitt skjal, sum sigur: Tygara barn er innskrivað í skúlanum her, men fyribils í Lopfjølini, so barnið hevur møguleika at koma aftur í sín upprunaskúla. 'Gamli skúlin' hevur ábyrgdina, tá barnið kemur út aftur ella um okkurt hendir.

Í lýsingini av Lopfjølini er tað staðfest, hvussu visitatiónin fer fram:
Næmingur kann bert verða fluttur í Lopfjølina í samráð við foreldur, næming, toymisleiðslu á Lopfjølini, BVT, avvarðandi skúla og Sernám.
Visitatiónsnevndin er samansett av leiðaranum í Sernámi, undirvísingarleiðaranum umboðandi skúlarnar, dagliga leiðaranum í Margarinfabrikkini og einum umboði vegna BVT.

Í tilvísingarbólkinum verður tað viðgjørt, hvussu mannagongdin í dagliga arbeiðnum er viðvíkjandi hesum. Tá Sernám fær fyrispurning um eitt barn at koma í Lopfjølina møguliga, so seta tey seg í samband við Sosialu deild. Men børn eru komin inn í Lopfjølina, uttan at tað er farið fram eftir røttum mannagongdum. Varastjórin í Skúlanum á Fløtum, sum hevur námsfrøðiligu ábyrgdina av Lopfjølini – og sum umboðar allar skúlarnar í ávísan mun, hevur ført fram, at børn eru komin inn í Lopfjølina, uttan at hon visti av. Tað verður sagt, at har eru nøkur viðurskifti viðv. visitatiónini, sum skulu hyggjast eftir og broytast.

Í samstarvinum millum Lopfjølina og Sernám er ein skipan, har sálarfrøðingur hevur vegleiðing og supervisión við teimum, sum eru í Lopfjølini. Tað, sum er avbjóðandi hjá Sernámi, er, at børnini í Lopfjølini eru knýtt at øðrum fólkum úti á skúlunum hjá teimum, sum varða av. Tá okkurt skal gerast í mun til barnið, so verður tað viðkomandi úti á upprunaskúlanum, sum kemur inn í myndina. Um tey í upprunaskúlanum hoyra eitthvørt um, at barnið t.d. ikki kemur í skúla, so eru tey í iva um, hvat tey skulu gera: Skal eg gera nakað, ella er tað í lagi, um eg einki fái at vita. Tað verður ein tvístøða, hvør ið hevur ábyrgd: Upprunaskúlin, har barnið er innskrivað, ella Lopfjølin, har barnið gongur í løtuni.

Tað er ikki nóg greitt fyri allar partar, hvussu tvørgeiraliga samstarvið eigur at fara fram fyri at virka best. Tað verður ført fram í tilvísingarbólkinum, at tá ein skúlastjóri hevur fingið at vita, at eitt barn í hansara/hennara skúla hevur so og so nógva fráveru, so hevði tað verið best, um allir partar, bæði innanhýsis í skúlanum, flokslærari, førleikastova og heilsufrøðingur, og Sernám, Sosiala deild og møguliga barnapsykiatriin, verða boðin á fund, so avbjóðingin hjá barninum kann verða viðgjørd so tíðliga sum gjørligt, har tað eru størstu líkindi fyri, at tað ber til at hjálpa barninum. Tað verður oftani ført fram frá skúlanna síðu, at upplýsingar um eitt barn verða hildnir aftur, so skúlin ikki er nóg væl fyrireikaður at taka sær av avbjóðingunum og hjálpa barninum. Gott nokk eru reglur viðvíkjandi persónligum upplýsingum – og reglur viðvíkjandi samtykki foreldranna, men hetta eru nøkur formleikakrøv, sum vanliga ikki eru nøkur forðing fyri at koma til allar upplýsingar, ið man hevur brúk fyri. Tað er meira ein spurningur, hvar málið steðgar á – og av hvørjum ávum.

Tá tað verður hugt frameftir í tilvísingarbólkinum, so er ein spurningur settur, nevniliga um hetta skúlatilboðið ikki kundi verið inni í einum vanligum skúla – og havt somu fakbólkarnar inni har. Svarið uppá hetta er, at tað avgerandi í hesum er nettupp, hvar ið hesi børnini kunnu vera. Margarinfabrikkin er fyri tey flestu av teimum tað besta staðið at vera í og fáa undivísing.

Tað varð eisini viðgjørt at hava innskrivingarskjal at útfylla, tá ein næmingur skal byrja í Lopfjølini. Har skal standa alt tað týdningarmesta viðv. upplýsingum um viðkomandi næming. Víðari skal tað standa, hvør kontaktar skúlar, kontaktpersónur til Lopfjølina, avtala um, hvat hendir, um barnið ikki møtir, hvør tekur so kontakt við hvønn....

Eitt, sum eisini verður nevnt í tilvísingarbólkinum, er at hava eitt eftirmetingarskjal, har lærarin og námsfrøðingurin í Lopfjølini skriva eina eftirmeting um, hvussu tað gekk hjá barninum i hesum skúlaárinum, so at upprunaskúlin fær tað og sær: Ok, hvussu gongur tað nú hjá honum. Á tann hátt fær upprunaskúlin eisini fylgt væl við.

## 6.5 Bólkasamrøða við skúlaleiðarar í Tórshavnar kommunu

Í leiðslubólkinum verður sagt frá, hvørjar royndir tey hava í skúlunum við samstarvi við Lopfjølina, og hvørjar royndir, tey hava við børnum, sum hava skúlaaftran.

Teir smáu skúlarnir hava ongar royndir við hesum børnum – og sostatt heldur ikki nakrar royndir við at samstarva við Lopfølina. Men allir teir stóru skúlarnir hava royndir við hesum.

Ymisk dømi verða nevnd. T.d. hevur man roynt við heima- og sjúkraundirvísing til ein næming, men tað gekk ikki væl. Síðani er næmingurin komin í Lopfjølina – og endaði við at fáa 9. fl. prógv. Hesin næmingur var stak dugnaligur, men tað vóru persónlig viðurskifti hjá viðkomandi, sum høvdu við sær skúlaaftran. Í skúlanum vóru tey væl nøgd við, at hesin møguleikin var til staðar. Foreldrini vóru eisini øgiliga glað fyri tiltakið.

Tað verður tosað um, at Lopfjølin hevur sín spíra í hesum her við heima- og sjúkraundirvísing. Eitt mál verður nevnt, har heima- og sjúkraundirvísing hevur verið sett í verk í hálvtannað ár við 10 tímum um vikuna, og tað er jú ein ógvuliga long tilgongd. Ein lærari kom heim, t.v.s. inn í heimið. Tað var sera fjálgt hjá næminginum at vera heima, hann slapp at vera í sínum dunnugarði har, og tað var ringt at fáa hann oman í Lopfjølina. Hann gongur so í 9. flokki nú – og er í Lopfjølini. So hann hevur ment seg at koma út millum onnur, men tað er lítið og einki samstarv milllum heimaskúlan og Lopfjølina.

Ein spurningur verður tikin upp her viðvíkjandi, hvør ið hevur ábyrgd í samstarvinum millum skúlan og Lopfjølina. Um einki samskifti er, so vita partarnir ikki av hvørjum øðrum, og so veit man heldur ikki, hvussu tað gongst viðkomandi næmingi – ella nær man skal gera nakað, um ein nýggj støða tekur seg upp. Tað eru ymiskar meiningar millum leiðararnar um hetta við ábyrgdini, t.d. um tað er ein spurningur um tíð, hvussu leingi upprunaskúlin skal hava ábyrgd av næminginum. Ella hvørja ábyrgd hevur Lopfjølin við at royna at halda samband við skúlan ella hesi børnini, sum barnið gekk saman við. Í hesum sambandi verður víst til ein fund um sernámsfrøðiliga økið, har ymsir partar vóru við, og har bleyv eisini tosað um Lopfjølina – og akkurát hatta har við sambandinum við heimaskúlan. Tað vóru eitt sindur ymsar meiningar um, hvar skúlin stendur og hvussu hann skal halda sambandið við Lopfjølina og næmingin – og til, at man heldur at: Ja, lat tey fáa kjansin at byrja í Lopfjølini heilt av nýggjum, uttan at heimaskúlin líkasum blandar seg uppí. Til tey eru komin so langt, at tey kunnu koma aftur.

Tvey dømi um næmingar úr einum skúla verða nevnd, har talan var um skúlaangist, sum tað her verður nevnt - og sum fingu tilboðið at fara í Lopfjølina. Tað hepnaðist ikki væl – í hvørgum føri. Skúlin vitjaði Lopfjølina saman við foreldrunum, og samstarvið sá út til at vera sera gott millum allar partar, men tann eini næmingurin fór heldur í heimaskúlan aftur enn í Lopfjølina. Skúlaleiðarin hevur varhugan av, at foreldrini vóru ikki nøgd við teir fysisku karmarnar í Margarinfabrikkini.
Annars vóru góðar avtalur gjørdar í hesum førinum millum skúlan, Lopfjølina og næming/foreldur, at tey skuldu vera knýtt bæði at skúlanum og Lopfjølini, so allur tann sosiali parturin, so sum tunnusláttur, jólahald ella seturskúla skuldu tey kunna vera partur av. Tey skuldu til eina og hvørja

tíð sleppa til tað, men fáa tann fakliga partin við í Lopfjølini, fyri at fáa tey upp á tað fakliga støði, sum er neyðugt fyri at kunna taka prógv.

Í mun til, um tað eydnast ella ikki eydnast at støðast í Lopfjølini, so verður sagt, at tað kemur øgiliga nógv ann uppá, um heimið sær tað sum eitt gott tilboð ella ikki. Í summum førum føla tey seg eitt sindur forskrekt av, at tað er eitt ella annað fremmant, ræðast tað eitt sindur, og tá sær tað út til ikki at eydnast. Og í øðrum førum tekur heimið, bæði næmingurin og foreldrini, ímóti tí sum eina útrættaða hond – og koma so inn og fáa faktiskt fín úrslit í mun til, hvørji tey eru og hvat fyri avbjóðingar, tey hava at dragast við. So samanhangurin millum at eydnast og ikki er eitt sindur hugburðurin til, hvat tað er fyri eitt tilboð: Er tað nakað, sum man er noyddur til – ella er tað ein útrættað hond...?
Skúlaleiðarar svaraðu uppá spurningin, hvørjar royndir tey hava við børnum við skúlaaftran. Har vóru ymsar royndir. Men eitt gekk aftur hjá nógvum, og tað er, at næmingarnir, sum tað snýr seg um, eru yngri. Á skúlunum eru tey ofta í iva, um tey kunnu søkja um upptøku í Lopfjølini, tá barnið fellur uttan fyri málbólkin, sum eru næmingar í 7., 8. og 9. flokkunum.

# 7. Niðurstøða

Virknaðurin í Lopfjølini seinastu 6 árini hevur víst, at tørvur er á slíkum skúlatilboðum. Tað hava verið 22 næmingar í Lopfjølini, har 89 % hava megnað at fingið eitt fólkaskúlaprógv, men endamálið við, at næmingarnir skulu arbeiða fram ímóti at fara aftur í upprunaskúlan hevur verið ein størri avbjóðing, tá tað bert eru 9 % av næmingunum, sum megna at fara aftur. Samstarv og samskifti millum fólkaskúlan og Lopfjølina er vantandi.

Samanumtikið kann staðfestast, at virksemi í Lopfjølini hevur gjøgnumgangandi eina positiva ávirkan á næmingarnar perónliga, sosialt og fakliga og hevur virkað sum ein lopfjøl, har næmingurin er mentur so mikið, at bæði hann sjálvur, starvsfólkini í Lopfjølini og foreldrini hava góðar vánir fyri einari gongdari leið við víðari útbúgving og/ella arbeiði eftir lokna gongd í Lopfjølini. Tað grundleggjandi í tilgongdini hjá lærarum og námsfrøðingum í Lopfjølini hevur í nógvum førum givið næmingunum sjálvsálit og dirvi til skúlan og lívið.

Samstarvið og samskiftið innanhýsis í Lopfjølini er ógvuliga gott. Har eru fýra fakfólk í einum toymi, og greiðar linjur eru í skipanini/bygnaðinum.

Tað tvørgeiraliga samstarvið er gott, og tað er skjótt at fáa samband partanna millum. Tað verður tó ført fram, at málsviðgerð hjá Sosialu deild, Sernámi og Barnapsykiatriska deplinum tekur ov langa tíð.
Tað er staðfest millum fakfólk í Føroyum (í tráð við tøl, ið vit kenna úr Danmark), at talið av børnum við skúlaaftran er vaksandi, og at børn við hesum avbjóðingum eru yngri enn upprunaligi málbólkurin (7. – 9. flokk)

## 8. Bókmentalisti/tilvísingar


Dahler-Larsen, P. & H. K. Krogsturp (2009). *Nye veje i evaluering.* Viborg: Academica

Johnson R.B & L. Christensen (2017). *Educational Research – Quantitative, Qualitative, and Mixed approaches.* London: SAGE

Kvale , S. & S. Brinkmann. *Interview – introduktion til et håndværk.* København: Hans Reitzels Forlag


# Fylgiskjøl

1. Endamál við eftirmetingini
2. Fylgiskriv við umsókn um loyvi
3. Skriv til foreldur um samrøðu
4. Skriv til fyrrv. næmingar um samrøðu
5. Interviewguide
6. Royndar- og menningarvirksemi
7. Søguliga gongdin
8. Lýsing av verkætlanini Lopfjølin 2014
9. Lýsing av verkætlanini Lopfjølini 2016
10. Tekstkut, næmingar
11. Tekstkut, næmingar
12. Tekstkut, næmingar
13. Tekstkut, næmingar
14. Tekstkut, næmingar
15. Tekstkut, foreldur
16. Tekstkut, foreldur
17. Tekstkut, foreldur
18. Tekstkut, foreldur
19. Tekstkut, foreldur
20. Tekstkut, foreldur